Oyggjablaðið
Mikudagur 18. august 2010 · Nr. 121

# EINGIN SKOMM AT FARA TIL SKIPS



**SJÓLÍV** Mikudagin 19. september 1962 gloymir Johnvá Josephsen ongatíð. Hetta var dagurin, tá línuskipið Jákup B fór til fiskiskap í Eysturgrønlandi. Og hetta var eisini dagurin, tá hon sum ein tann fyrsta kvinnan - um ikki tann fyrsta - fór til skips við føroyskum skipi. - Ja, eg minnist, at fólk bæði grótu og illa lótu, tá vit løgdu frá landi henda dagin, greiðir Johnvá frá. - Tey væntaðu als ikki, at eitt skip við eini kvinnu umborð kundi bera boð aftur í bý!

**Tekstur: Snorri Brend**
*Myndir: Álvur Haraldsen*

At fara til skips bert 16 ára gomul, var ikki nakað sum nógvar aðrar føroyskar kvinnur høvdu gjørt frammanundan.

Fyri Johnvá var hetta ikki so nógv at rópa hart upp um. Hon hevði mangan verið umborð á báti áður, og heima við hús var nógv prátað um fiskiskap og útróður.

Bæði pápi hennara og tann elsti beiggin vóru sjómenn, og tað kom meiri enn so fyri, at hon var við, tá teir umborð á Liljuni landaðu fisk í Sørvági, haðani hon eisini hevur ættarbond.

Nú var tann lívsfríska og arbeiðsfúsa gentan til reiðar at fara undir eina nýggja avbjóðing. Hon hevði arbeitt eitt sindur sum arbeiðsgenta, m.a. í heiminum hjá manninum, ið kom at gerast skipari hennara henda túrin - Sigmund Heinesen í Klaksvík.

- Ein dagurin spurdi hann meg, um eg visti onkran sum kundi koma við sum messudrongur við Jákup B á einum túri til Grønlands. Eg svaraði honum, at tað kundi eg gott gera. Hetta kom helst nakað óvart á hann, tí hann svaraði, at hetta mátti hann tyggja eitt sindur uppá tað.

- Eg spurdi síðani foreldrini um loyvi: Mamma var ikki heilt við uppá tað, men pápi spurdi meg bara, hvønn eg skuldi til skips við. Tá eg so segði, at tað var við Jákup B og við Sigmundi sum skipara, svaraði hann bara: "Tað var ikki so býtt", greiðir Johnvá brosandi frá.

19. september fyri sløkum 48 árum síðani legði Jákup B út á nýggjan túr við Johnvá sum messugentu. Hóast hon hevði fingið játtilsi frá foreldrum sínum, vóru tað kortini ikki øll ið vóru eins fegin um hetta.

- Tá vit løgdu frá landi var lagið gott umborð og vit sungu ymiskar sangir. Men fyri tey mongu, sum stóðu eftir á bryggjuni var hetta ein rørandi løta, og fleiri grótu, millum annað mamma mín. Tey væntaðu heilt einfalt ikki, at vit fóru at fóru at koma heilskapað aftur, nú ein kvinna mynstraði við.

Hinvegin vísti tað seg, at tey bóru boð aftur í bý. Gjørdu ein skjótan og sera góðan túr í Eysturgrønlandi, sum bert vardi í góðan hálvan annan mánað. Og tann unga Johnvá slapp at royna alt tað sum kundi roynast umborð á einum slíkum línuskipi sum Jákup B.

- Eg keddi meg ikki eina einastu løtu á túrinum, sigur Johnvá Josephsen, ið sjálv mynstraði sum nr. 25 henda túrin, har hon samstundis rundaði tey 17 árini.

## Systir og dóttir

Liðin eru fimmti ár, síðani línuskipið Jákup B og Klakkur komu á Klaksvík fyrstu ferð. Hetta fer sjálvandi ikki aftur við borðinum, men verður heiðrað soleiðis sum tað sømir seg á sjómannadegnum leygardagin.

Tað eru kanska ikki øll sum vita tað, at longu tvey ár eftir hetta, mynstraði ein kvinna umborð á Jákupi B sum messudrongur. Hetta varð samstundis hennara fyrsti og einasti túrur til skips.

Frammanundan hevði kokkurin, Erling Joensen úr Gjógv proviianterað til allan túrin, og tí var lætt og einfalt hjá teirri ungu klaksvíkgentuni at fara til verka í messuni.

Johnvá kendi nógvar av teimum ungu dreingjunum sum fóru við. Fleiri teirra vóru á sama aldri sum hon, og aðrir eldri. Hóast hon var einsamøll kvinna umborð, varð hon ongatíð happað av hesi orsøk.

- Nei, eg kenni einki til orðið

**» Tey væntaðu heilt einfalt ikki, at vit fóru at fóru at koma heilskapað aftur, nú ein kvinna mynstraði við**

**» Tá eg setti suppuna á borðið segði hann bart út, at hann skoytti í øllum førum ikki um trussu-suppu**

## Trussu-suppa, ger so væl!

At vera einsamøll kvinna í einum mannfólkaheimi, og enntá umborð á einum skipi, var helst ikki tann stóra avbjóðingin fyri ta 16-17 ára gomlu klaksvíksgentuna.

Johnvá royndi sum frægast at ignorera mannfólkaprátið, men ikki óvæntað komu støður, har gingið varð henni heldur nær.

Henda eina dagin hevði hon fylt sær ta stóru grýtuna við vatni, tí nú skuldu viskistykkini kókast. Hetta løgdu teir sjálvandi merki til, serliga ein av ungu monnunum.

- Hann gav mær tá eitt ordiligt prik, tí tá eg setti suppuna á borðið segði hann bart út, at hann skoytti í øllum førum ikki um trussusuppu.

- Skiparin hoyrdi hetta, og gav honum av grovfílini fyri tað sum hann hevði sagt um meg. Tja, eg veit líka, hann bleiv so seinni eisini forlovaður!